

## Tann stóri føroyski frumframførslu dagurin nærkast

Tórshavnar Stór Band er einasta big band í Føroyum. Orkestrið er partur av Tórshavnar Musikkskúla og leggur seg eftir at hava landsins bestu næmingar og tónleikalærarar í rútmiskum tónleiki við. Orkestrið fer at hava konsert á Summartónum við ikki færri enn átta frumframførslum. Øll løgini eru antin skrivað ella løgd til rættis (útsett) til hetta høvið. Tórshavnar Stór Band hevur síðstu trý árini gjørt nógv um seg her heima og hevur fingið ikki færri enn 18 nýggj føroysk verk skrivað til orkestrið. Átta av teimum vera so møguleiki at hoyra á Summartónum.



# Fingu ein dag at fyrireika roykibann

**Barrir og dansistøð fýlast á, at tey hava fingið kunning um roykibannið alt ov seint**

ROYKING

*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Almanna- og Heilsumálaráðið sendi skriv út til barrir og dansistøð sunnudagin 29. juni og gav teimum tí bert ein dag at fyrireika roykibannið.

- Eg havi sagt fleiri ferðir, at tað er ov illað kunnað. Í øðrum londum hevur tú havt høvið at fyrireika teg, áðrenn ávíst roykibann er komið í gildið, sigur Hans Andreasen, eigari av dansistaðnum Glitnir, vit hava sjálvi kannað viðurskiftini, tí at vit einki hava fingið at vita frá almanna- og heilsumálaráðnum.

- Sjálvandi kann mann fýlast á, at kunningin hevur verið ov vánalig. Vit hava sæð og hoyrt til lógaruppskotið leingi, og tí er hetta ikki komið sum eitt sjokk, sigur Janus Einar Sørensen, partaeigari í Byin.fo, men vit hava onga kunning fingið beinleiðis til okkum.

Almanna- og heilsumálaráðið greiðir frá, at ítøkiligt skriv er sent út til øll dansistøð og barrir sunnudagin 29. juni, men hetta er alt ov seint til at fyrireika seg, siga teir báðar, Hans Andreasen og Janus Einar Sørensen.

Tá ið Sosialurin tosaði við Almanna- og heilsumálaráðnum, søgdu tey, at eingin ventilatiónsskipan er nóg góð at hava í einum rúmi, har ikki-roykjarir eru til staðar. Hans Andreasen er tó ikki samdur í hesum.

- Hetta hølið er trý ára gamalt, og her ein ventilatiónsskipan, ið riggar sera væl. Míni starvsfólk, ið ikki roykja, siga seg ikki merkja nakað til royk, tá ið tey eru til arbeiðis í Glitnir.

Tá ið Sosialurin spyr, hví barrir og dansistøð fýlast á kunningina, svarar Almanna- og heilsumálaráðið soleiðis:

- Lógin varð samtykt 10. juni í ár, men hevur verið nógv frammi áður. Tey mugu hava verið vitandi um lógina, tí tað hevur verið nógv frammi

í almenninginum. Vit vita væl, at tað eru fleiri, ið siga, at kunningin er komin ov seint, men tá noyðist mann bara at taka til sín. Vit sendu skriv út til millum annað dansistað og barrir sunnudagin.

Sambart nýggju roykilógini er ikki møguligt hjá danstøðum og barrum at byggja sær roykirúm.

### Føroyska roykilógin er nógv strangari enn danska

Stórur munur er á donsku og føroysku roykilógina, tá hugsað verður um undantaksloyvir. Millum annað sigur danska roykilógin, at er ein barr minni enn 40 kvadratmetur, er loyvt at roykja inni. Er barrin hinvegin størri enn so, ber til at hava roykirúm.

Í Føroyum loyvir lógin bert privatum fyritøkum at hava roykirúm á arbeiðsplássinum - men ikki almennum. Hetta er loyvt í Danmark sambært donsku roykilógini, greiðir Almanna- og heilsumálaráðið frá, tá ið Sosialurin spyr, hvat størsti munurin er á donsku og føroysku roykilógini. Undantøkur kunnu tó gerast á føroyskum ellis- og røktarheimum, privatum bústovnum, viðgerðarstøðum, privatum arbeiðsplássum og á kømrum á skipum, stendur í stk. 4 í Løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking.

### Tubbaksvørur krógvast burtur

Frá í dag, 1. juli, skulu allar tubbaksvørur krógvast burtur, har viðskiftarfólkið ikki sær. Almanna- og heilsumálaráðið greiðir frá, at hetta er ein avleiðing av lógini, ið bannar allari lýsing av tubbaksvørum. Almanna- og heilsumálráðið sigur, at tað er ein lýsing av vøruni, tá ið hon stendur frammi í handlinum.

- Tað, sum er hugsað, er at forða lýsing av tubbaksvørum og ikki at undirmetað fría valið hjá menniskjanum, sigur ráðið.

Tá Sosialurin spyr, um tað er ein lýsing av bommi, tá bomm stendur frammi á hillunum, svarar Almanna- og heilsumálaráðið soleiðis:

- Tubbak er heilsuskaðiligt og er tí ikki ein vanlig vøra.